UTTAN ÚR HEIMI

# ES ásett kvotur

**Danir eru nøgdir við sín part, hóast partar av vinnuni fáa trupulleikar**

ÚTLAND
*Fartekst*

Fiskimála- og matvørumálaráðharrarnir í ES-londunum hava gjørt sáttmála um fiskikvoturnar næsta ár.

Samráðingarnar gjørdust drúgvari enn væntað, tí í veruleikanum var semja um eitt uppskot, sum lá á borðinum, tá ráðharrarnir fóru til Bruxelles. Men tá ráðharrarnir skuldu taka støðu, sýtti Frakland fyri at góðtaka uppskotið. Kortini eydnaðist at finna eina semju, og Frakland fekk í veruleikanum lítið og einki burtur úr sínum mótmæli.

Umframt kvoturnar samdust ráðharrarnir um eina sonevnda menningarætlan fyri fiskimenn í ES-londunum. Eitt av málunum við skipanini er at laga fiskiflotan til tað tilfeingið, sum er til taks.



*Umframt kvoturnar samdust ráðharrarnir um eina sonevnda menningarætlan fyri fiskimenn í ES-londunum*

**Danir nøgdir**
Danskir fiskimenn og serliga teir, sum veiða í Norðsjónum, stúrdu fyri fundinum í Bruxelles, tí ES-nevndin hevði mælt til munandi niðurskurð í summum kvotum. Tí var formaðurin í danska fiskimannafelagnum væl nøgdur, tá tað kortini eydnaðist at fáa ein sátttmála, sum danska vinnan kann laga seg eftir.

– Hetta er munandi betur, enn eg hevði væntað, men vit noyðast at viðurkenna, at møguleikarnir gerast minni og minni, sigur Bent Rulle.

Hann viðgongur, at summir danskir fiskimenn fáa trupulleikar við teimum nýggju kvotunum. Talan er serliga um teir, sum fiska tosk í Kattegat og teir, sum fiska reyðsprøku í Norðsjónum, Skagerak og Kattegat.

## Trygdarvørður í Pentagon undir illgruna

**Amerikansku myndugleikarnir hava illgruna um, at ein trygdarvørður í Pentagon hevði samband við teir, sum rændu flogfarið, ið rendi á verjumálaráðið tann 11. september**

ÚTLAND
*Fartekst*

Maðurin, sum er ættaður úr Somalia, arbeiddi fyri amerikansku deildina hjá svenska trygdarfelagnum Burns, skrivar svenska blaðið Aftonbladet.

Muhammed Abdi hevur sitið í fongsli í Alexandria í statinum Virginia síðani mánaðarskiftið oktober-november, eftir at myndugleikarnir funnu navn og telefonnummar hansara í bilinum hjá einum av teimum, sum rændu flogfarið, ið rendi á Pentagon.

Maðurin hevur greitt myndugleikunum frá, at hann dugir ikki at skilja, hvussu hansara navn og telefonnummar er endað í bilinum hjá Nawaf Alhazmi. Bilurin stóð á einum støðuplássi uttan fyri floghavnina í Dulles, har yvirgangsmenninir rændu flogfarið hjá American Airlines, sum seinni stoytti seg niður í Pentagon.
Tað eru ikki einans navnið og telefonnummarið, sum knýta somaliumannin at yvirgangsmonnunum. Amerikansku myndugleikarnir eru komnir eftir, at Muhammed Abdi lat fimm vaktarbúnar frá sær tríggjar dagar eftir atsóknina til 11. september.

Menninir, sum rændu flogfarið hjá American Airlines, vóru fimm í tali.

# Bin Laden kanska deyður

**Samstundis sum afghanskir hermenn leita eftir Osama bin Laden í fjallalendinum har eysturi í Afghanistan, siga amerikanska myndugleikarnir, at yvirgangsleiðarin kanska er deyður.**

ÚTLAND
*Fartekst*



*Amerikanarar viðganga, at teir vita ikki, hvar bin Laden er*

Leitingin eftir bin Laden varð í gjár darvað av tí ringa kavaveðrinum, sum hevur verið nógvastaðni í Afghanistan teir báðar seinastu dagarnar, men kortini hildu hermenn hjá Eystursamgonguni fram við leitingini í Tora Bora. Samstundis leita amerikanskir og bretskir hermenn nærri pakistanska markinum.

Amerikanarar viðganga, at teir vita ikki, hvar bin Laden er, men fleiri hermenn hjá Al-Qaeda, sum nú sita fangar, skulu hava greitt frá, at leiðari teirra framvegis er í fjøllunum har eysturi í Afghanistan.

Mánadagin segði talsmaðurin hjá amerikanska verjumálaráðnum Pentagon, at USA hevur ongar álítandi upplýsingar um, hvar bin Laden er, og nú sigur Paul Wolfowitz, varaverjumálaráðharri, at bin Laden kanska er deyður.

– Tað er als ikki óhugsandi, at hann liggur deyður í onkrari av holunum í Tora Bora, sigur Paul Wolfowitz.

Men tað halda leiðararnir hjá afghansku Eystursamgonguni ikki.

– Er Osama bin Laden har, høvdu menninir hjá Al-Qaeda hildið fram við bardaganum. Teir valdu at geva seg yvir, og tí er tað óhugsandi, at hann er har, sigur leiðarin í Eystursamgonguni, Mohammed Aman Khiari.

Arbeiðsfólkið á Kósini:

# Uppundir hendur í fiski



*Hetta er ein av teimum heilt stóru vikunum á Kósini. Fýra línuskip og tríggir trolbátar hava landað til virkið*

**– Vit arbeiða í tveimum vaktum alla hesa vikuna, men spurningurin er, um gólvini verða turr fríggjadagin, siga tey á Kósini**

*Vilmund Jacobsen*

– Vit hava skítfult av fiski!

Hetta vóru greiðu boðini, vit fingu av Kósini mikumorgunin. Og rætt er tað.

Fýra línuskip og tríggir trolbátar hava landað til virkið hesa vikuna.

Polarstjørnan hevði 160.000 pund, Klakkur 145.000, Núpur 90.000 og Kvik hevði 110.000 pund.

Á Kósini siga tey, at slagið hjá línubátunum var toskur og hýsa, umleið helvtarbýtt.

Trolbátarnir, sum hava landað til virkið, eru Sæborg, sum hevði 65.000 pund, Gáshøvdið 25.000 og Varðin, sum hevði 30.000 pund.

Aftrat hesum keypti Kósin 100.000 pund á uppboðssøluni í Klaksvík síðsta fríggjadag og leygardag.

**Arbeiða í vaktum**

Á Kósini siga tey, at tað fer at standa á at fáa fiskin undan til fríggjadagin, hóast tey arbeiða í tveimum vaktum, frá kl. 8 á morgni til kl. 16 og frá kl. 16 til midnátt.

– Vit vóna, at gólvini verða turr, tá ið seinasta vaktin fer heim á midnátt fríggjakvøldið, men verða tey ikki tað, noyðast vit til arbeiðis aftur leygardagin.

So tey, sum tjena sínar pengar á Kósini, hava nóg mikið at hugsa um nú beint undan jólum.

# Jólamaður, jólatónleikur og Trøll í SMS

**Hendan vikan í SMS ber veruliga dám av jólum. Jólamaðurin Kjøtkrókur vitjar, og ungir tónleikarar framføra jólatónleik á Torginum**

JÓL
*Tíðindaskriv*

Í síðstu viku tók jólamaðurin Kjøtkrókur ímóti suttum á Torginum í SMS. Og hann vitjar aftur í hesi vikuni. Hesaferð tekur hann tó ikki ímóti suttum.

Nei, hann fer at bjóða øllum børnum, sum vitja í SMS, okkurt gott. Hósdagin ímillum kl. 11.00-12.00 og 16.00-17.00 er hann fyrstu ferð í SMS. Fríggja- og leygardagin vitjar hann ímillum kl. 11.00-12.00 og 16.00-18.00.

Sunnudagin 23. desember vitjar hann kl. ímillum kl. 14.00-16.00 og kl. 18.00-20.00.

**Jólatónleikur á Torginum**

Nú jólini nærkast, verða fleiri framførslur á Torginum í SMS, har serliga ungfólk fara at spæla jólatónleik. Hósdagin kl. 15.00 verða Ungu Stjørnuskotini á Torginum, har lættur jólatónleikur verða á skránni. Aftaná framførsluna bjóða tey piparnøtur. Fríggjadagin kl. 15.00 og leygardagin kl. 18.00 framføra 5 ungfólk, ið saman nevna seg Saxtettin, jólatónleik framman fyri jólabýnum á Torginum.

Seinasti bólkurin, sum spælir á Torginum, eru ung úr Tórshavnar Ungdómshornorkestri. Tey spæla leygardagin kl. 14.00.

**Trølla Pætur og Omman vitja**

Í samband við nýggja filmin hjá Trølla Pæturi og Ommuni, ”Hvar er Nósi”, vitja tey bæði á Torginum leygardagin kl. 15.00. Tey fara m.a. at skriva undir nýggja filmin og eisini ber til at ogna sær teirra undirskrift á aðrar lutir, um onkur ynskir tað.

Fram til jóla hava handlarnir í SMS opið til kl. 20.00 hvørt kvøld.

Sunnudagin 23. desembur er tó opið frá kl. 14.00-22.00. Jólaaftan er stongt.

Gleðilig jól og gott nýggjár, heilsa tey úr SMS.



# Jólaboðskapurin

Sí, eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð, sum skulu vera fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði! Luk. 2, 10–11.

Nú jólini aftur nærkast og bæði smá og stór gleða seg til hesa undurfullu hátíð, tá Gud sendi son sín til jarðar við einum einasta endamáli, at bjarga okkum frá ævigari glatan og leiða okkum frelst heim í sítt himmalska ríki.

Tað hevur ofta verið sagt bæði í talu skrift, at jólini hava ikki altíð verið kristin, og tað er eisini so satt sum tað er sagt; jólini eru kristin hátíð við Jesusi Kristi. Tá Maria átti Jesusbarnið og legði tað í krubbuna í fjósinum, var tað av teirri grund, at tað onga aðrastaðni var rúm fyri teimum, Mariu, Jósefi og Jesusbarninum.

Jesus er heimsins frelsari, hann vil vera tín og mín frelsari, er hann okkara frelsari, so kunnu vit búgva okkum til at halda jól saman við honum og gleða okkum saman um hesa signaðu jólahátíð, soleiðis at Jesus verður okkara jólagestur; eiga vit hann í hjørtum okkara, so eiga vit eina gleði, sum varar alt lívið. Gud gevi okkum at halda eini sonn kristin jól í Jesu navni.

Men Maria legði sær øll hesi orð í geyma og hugsaði um tey í hjarta sínum. Og hirðarnir fóru avstað aftur, og teir lovaðu og prísaðu Gudi fyri alt tað, sum teir høvdu hoyrt og sæð, soleiðis sum tað hevði verið sagt við teir. Luk. 2, 19–20.

So vil eg enda við einum jólasálmi, sum eg havi yrkt til jólini 2001. Gleðilig jól og gott nýggjár øll somul.

## Jólasálmur

Lag: Nú ringja klokkur jólafest

Nú kirkjuklokkur ringja hátt,
eitt undur stórt ta jólanátt;
tá birtist ljós í myrku verð,
tí frelsarin oss føddur er.

Maria son Guds bar í heim,
tí syngja vit við gleði, gleim;
og takka Gudi hjartans glað,
um barnið, føtt í Dávids stað.

Stór gleðiboð um víðan vøll,
tey ljóða enn í smáttu, høll;
um jólagleði, jólafrið,
um gleði sum kann vara við.

Í Guds hús bæði stór og smá,
vit boðskapin har lýða á;
sum hirðar hoyrdu jólanátt,
Maria hevur barnið átt.

Um jólatræið lið um lið,
foreldur, børn nú syngja við;
hin glaða jólasálm á jørð,
sum ljóðar yvir fjøll og fjørð.

Gud gevi oss at halda jól,
tí Jesus, hann er heimsins sól;
sum fløvar hvørt eitt hjarta her,
og sanna jólagleði ber.

**Kjartan Stakksund**